# Stjørna í eitt kvøld !



Uppliv eitt hugnaligt kvøld á Fortuna við góðum mati og sangundirhaldi leygarkvøldið 15. november.
Gestirnir fáa høvi at tekna seg til Karaoke-kapping, undir leiðslu av okkara væIdámda **DJ MARTIN KJÆRBO**

Besti sangarin verður kosin av einum dómarapaneli.

Tey, sum ætla at luttaka í kappingini, kunnu tekna seg frammanundan á telefon 223000 ella á staðnum.

**Vinnandi sangarin fær ein ferðaseðil við Altantic Airways, latin av Føroya Bjór**

Borðreitt verður við spareribs, salat, sós og dollarschips, omaná við ísdesert.
Kostnaður fyri borðhaldið er 220,-

Luttøkugjaldið fyri sangarar er bert 100,- og tá er matur íroknaður.

Kvøldið byrjar kl. 19.00 og eftir kl. 24.00 er almennur dansur í BAROK har Martin skipar fyri.

restaurant FORTUNA

TELEFON 223000

## Framløga av kanning av viðurskiftunum hjá apopleksiraktum og fundur í Útvarpshøllini

Heilafelagið hevur saman við Granskingardeplinum fyri Økismenning gjørt eina kanning av viðurskiftunum hjá apopleksiraktum í Føroyum. Í hesum sambandi skipa vit fyri einum almennum fundi í Útvarpshøllini leygardagin 8. november 2003 kl. 15.00.

**Skrá fyri fundin**

1. Vælkomin (Tórunn Guttesen, Heilafelagið)
2. Hvat er apopleksi? (Lars Storr, lækni)
3. Framløga av kanning (Dennis Holm, Granskingardepilin fyri Økismenning)
4. Hvat er ein góð viðgerðargongd? (Lars Storr, lækni)
5. Ein sjúkrasøga (Napoleon Joensen, apopleksiraktur)

Steðgur

6. Pallborðsfundur: Bill Justinussen landsstýrismaður í Heilsumálum, Páll á Reynatúgvu landsstýrismaður í Almannamálum, Petra Joensen leiðari á Almannastovuni, Palli Mortensen leiðari á Hjálpartólamiðstøðini, Napoleon Joensen apopleksiraktur, Lars Storr lækni og Paula Árnafjall sjúkrarøktarfrøðingur og nevndarlimur í Heilafelagnum.
7. Hugleiðingar um at vera ein bólkur í samfelagnum, sum er annaðleiðis (Elin Súsanna Jacobsen, søgufrøðingur)

**Heilafelagið**
Íslandsvegur 10
100 Tórshavn
Tlf. 32 15 20

*Heilafelagið er felagið fyri apopleksi- og afasirakt í Føroyum.*

*Endamálið hjá felagnum er at bøta um korini hjá apopleksi- og afasiraktum.*

www.sosialurin.fo

TK Stovan

thebitland.com

BitTing - Kunningarfundur um

## Talgildar sjúklingaupplýsingar

**Fundurin verður á Hotel Føroyum hósdagin 13. novembur frá kl. 13.30 til 16.30**

Ætlanir um at fara undir at talgilda sjúklingaupplýsingar í Føroyum eru frammi. Á BitTinginum 13. novembur verður høvi at hoyra um áhugaverda verkætlan um talgildar sjúklingaupplýsingar í Uppsala. Benny Eklund, verkætlanarleiðari frá Akademiska Sjukhuset, fer at røða um royndir og ætlanir í Uppsala.

Á BitTinginum verður pallborð við útlendskum gestum, ið arbeiða og hava royndir við talgildum sjúklingaupplýsingum. Gestirnir eru m.a. umboð frá Siemens og IBM. Fyrilestur og kjak verða á enskum.

Kl. 17.30 verður LoftTing á Vertshúsinum har luttakararnir eru vælkomnir. Tá fer Lawrence Tarbox frá Siemens at hava stutta framløgu um Siemens. Høvi verður at hitta útlendsku gestirnar og luttakarar annars. Bitland bjóðar tvíflís og drykkjuvørur.

BitTingið er eitt av nógvum tiltøkum, sum Bitland-átakið skipar fyri í heyst. Endamálið er at kanna møguleikarnar fyri, at Føroyar kunnu gerast ein nýskapandi fyrimynd, tá ið tað ræður um at gagnnýta tøkni; t.d. við at virka sum kanningardepil og sýnisgluggi hjá áhugaðum útlendskum fyritøkum.

**Skrá**

| | |
|---|---|
| **13.30** | Bill Justinussen, landsstýrismaður, bjóðar luttakarunum vælkomnum |
| **13.45** | "One record – one patient" - Talgildir sjúklingaupplýsingar í heilsuverkinum í Uppsala. Benny Eklund, Akademiska Sjukhuset i Uppsala, røður um verkætlanina |
| **14.50** | Kaffisteðgur |
| **15.10** | Spurningar frá pallborði og kjak |
| **16.00** | Tikið verður samanum |
| **16.30** | BitTingið endar |

Vilt tú melda teg til BitTingið er neyðugt at siga TK Stovuni frá á telefon 317366 ella við at senda faks til 319363 ella teldupost til tk@tk.fo.

Kunningarfundurin kostar 300,- uttan mvg. Seinasta freist at tekna seg til luttøku er mikudagin 12. novembur. Tekningin er bindandi.

**TK Stovan**
Niels Finsens gøta 37, FO-100 Tórshavn
**Tel** +298 317366, **Faks** +298 319363
tk@tk.fo
www.tk.fo

**VILJI VITAN VØKSTUR**
TK Stovan er ein liður í arbeiðinum at menna føroyska vinnulívið og samstundis ein partur av tí umfevnandi danska TIC-kunningarsamstarvinum

## Jólafrokost

Leigi eitt karaokie anlegg við 1200 songum til tykkara jólafrokost. Sera gott til fyritøkur.
Møguliga tann einasti møguleikin at flenna eftir stjóranum.
Tit kunnu eisini leiga sumodraktir afturvið.

Sera sera bíligt. Vit hoyrast

**Sp/f Tatanka**
Tel 214500

Lesið Sosialurin -tað loysir seg



# Stuðlar til Stuðulsfólka-skipanina fyri vaksin

Stuðulsfólkaskipanin fyri vaksin fevnir um alt landið, og hevur til endamáls at veita sosialpedagogiska hjálp, fylgi, eftiransan og umsorgan. Harumframt eru røktar-uppgávur, sum eru skipaðar í samstarvi við Heimarøktina.

**Stuðulsfólkaskipanin fyri vaksin ynskir stuðlar, ið m.a.:**

- kunnu arbeiða sjálvstøðugt og einsamøll í heimi brúkarans og samstundis eisini kunnu átaka sær at arbeiða í einum øki, har tað ræður um intuitión
- vísa áhuga og virðing og samstundis vera professionellir
- eru stuðlandi og hjálpa brúkaranum uttan at taka ábyrgdina fyri lívinum frá honum
- eru sterkir - bæði til sálar og likam
- kunnu handfara og trívast við einum arbeiðsdegi, ið einki kann sigast um frammanundan

**Størvini verða sett skjótast gjørligt. Søkt verður eftir stuðul til:**

### Tórshavn:

***Maður 26 ár, menningartarnaður.*** Uppgávurnar eru m. a. at fylgja og aktivera til ymiskar sosialar aktivitetir.

**Arbeiðstíðin er 10 tímar um vikuna, eftir kl.16.00, eventuelt vikuskiftir.**

***Maður 19 ár, menningartarnaður.*** Uppgávurnar eru m.a. at fylgja og aktivera og fáa ein innihaldsríkan dagligdag. Umsøkjari við útbúgving hevur fyrimun. Eventuelt pædagoglesandi. Møguleiki er at deila uppgávurnar í tvey.

**Arbeiðstíðin er 20 tímar um vikuna, eventuelt vikuskiftir.**

***Kvinna 49 ár, sálarliga illa fyri.*** Uppgávurnar eru m. a. at menna sosialan førleika. Arbeiðstíðin er 10 tímar um vikuna.

### Eysturoy

***Genta 18, situr í koyristóli og er seinment.*** Uppgávurnar eru at fylgja henni til ymiskar aktivitetir og stimbra hana í dagligdegnum. Koyrikort krevst.

**Arbeiðstíðin er 25 tímar um vikuna,**

### Klaksvík:

***Kvinna 46 ár, sálarliga illa fyri.*** Uppgávurnar eru m. a. at stimbra hana í teimum dagligu uppgávunum í heiminum og at fáa ein innihaldsríkan dagligdag.

**Arbeiðstíðin er 10 tímar um vikuna.**

### Sandoy:

**Kvinna 41 ár, í hevur disseminera sclerosu.** Uppgávurnar eru millum annað, at fylgja henni til ymisk tiltøk út av húsinum og teimum dagligu uppgávunum í heiminum.

**Lønar- og setunartreytir:**
Talan er um størv innan Heimarøktina og Serforsorgina og roknast má við, arbeiðstíðirnar av og á eru skiftandi, dag-, kvøld, og vikuskiftisarbeiði.
Løn sambært viðkomandi yrkisfelag og Fíggjarmálaráðið.

**Umsóknarfreistin**
er sett til mánadagin 17.11.03.
Nærri fæst at vita hjá serráðgeva, Odu Johansdóttir, tlf. 354024.

**Umsóknir skulu sendast til:**
**Stuðulsfólkaskipanin fyri vaksin**
Att.: Oda Johansdóttir
Niels Finsensgøtu 28, 2. hædd, Fo -100 Tórshavn,
Tlf: 354024 - Telefax 353021


# Starvslýsingar á www.portal.fo

Kostnaður: (um lýsingin eisini er í Sosialinum)

| | |
|---|---|
| 1 vika | kr. 500,- |
| 2 vikur | kr. 750,- |
| til freistin at søkja er úti: | kr. 1.000,- |

Kostnaður: (um lýsingin ikki er í Sosialinum)

| | |
|---|---|
| 1 vika | kr. 750,- |
| 2 vikur | kr. 1.000,- |
| til freistin at søkja er úti: | kr. 1.250,- |

**2 lýsingar = -20% í avsláttri**
**3 ella fleiri = -30% í avsláttri**

Sosialurin
tel 341800 · fax 341801
teldupostur: lysing@sosialurin.fo


# ÚTBJÓÐING

Vegna Fámjins kommunu, verður arbeiðið uppá gerð av vegi, kloakk v.m. boðið út í almenna lisitatión.

**Arbeiðið fevnir í høvuðsheitum um:**

- 190 m av vegi við tilhoyrandi installatiónum
- Regulering av 600 m2 vegi/lendi.
- Umleið 1000 m av kloakk.
- 6 x 8 m hús.
- Ymisk jørðarbeiði

Útbjóðingartilfarið skal bíleggjast hjá HMP-Consult Sp/f innan mikudagin 12. november, og verður útflýggjað móti eini kvittan um, at veðhald á kr. 3.000,00 er sett á konto nr. 9181-140.518.9 í Føroya Sparikassa.

Tilboð í afturlatnum brævbjálva, merkt "Tilboð" skulu vera Fámjins kommunu í hendi í seinasta lagi **hósdagin 04. desember kl. 14.00**, tá ið lisitatiónin verður.

Veðhaldið fæst aftur, um útboðstilfarið verður latið óskalað inn aftur í seinasta lagi eina viku aftaná lisitatiónina.

RÁDG. VERKFR. HMP CONSULT Sp/f,
Óluvugøta 12 • FO-100 Tórshavn.
Telefon 312279 • Telefax 318346,
Teldupostur hmp@hmp-consult.com

hmp CONSULT VERKFRØÐIRÁÐGEVING

SISERO 351800

www.sosialurin.fo